VIÐMERKINGAR

# Okkara rættur til altjóða samstarv

VAL05

**Jón Guttesen**
*Valevni Tjóðveldisflokksins á Fólkating*

Fullur limaskapur í norðurlandaráðnum er vágskálin har okkara sjálvsavgerðarrættur í altjóða høpi verður vigaður, har okkara førleiki og rættur til altjóða samstarv verða royndir og Tjóðveldisflokkurin stendur einsamallur og verjir borg.

Føroya løgting stóð saman um, at krevja fullan limaskap í norðurlandaráðnum. Vit skulu út í heim, vit vilja nærkast okkara brøðratjóðum, og vilja samstarv á jøvnum føti og uttan haft.

Tjóðveldisflokkurin hevur við Norðuratlandsbólkinum skapt stórstu virðing fyri søk føroyinga á Fólkatingi, og virksemi í Norðuratlandsbólkinum er skýrt verða stórsta nýbrot á fólkatingið, farnu setuna.

Og virðingin skapt fyri norðuratlandsbólkinum skal nýtast í strembanini eftir, at fáa virðing fyri Føroya Løgtingi og avgerðum tess.

Fullur limaskapur í norðurlandaráðnum er eisini vágskálin har Føroya Løgting verður viga. Tann sum einki krevur – vinnur einki. Og ABC flokkarnir krevja ikki og vinna einki.

Tjóðveldisflokkurin vinnur støðugt og áhaldandi Føroyum frama á fólkatingi - eisini tá tað ræður um okkara rætt til altjóða samstarv.

# Góðu føroyingar

**Týsdagin hava tit seks flokkar at velja ímillum, men bert tveir veruligar politiskar valmøguleikar.**



VAL05

**Edmund Joensen**
*Sambandsflokkurin*

Tað tykist sera torført hjá polittisku flokkunum á loysingarvonginum at greiða Føroya fólki frá, hvat teir skulu brúka fólkatingssessirnar til. Vit í Sambandsflokkinum eru ikki í iva.

Vit verða ikki uttanveltaðir á fólkatingi. Vit tora at taka eina støðu, og vit fara at arbeiða fyri øllum áhugamálum hjá føroyingum í Føroyum, føroyingum í Danmark, ja hjá øllum føroyingum, uttan mun til hvar teir eru staddir.

Vit ætla okkum ikki sum Javnaðarflokkurin at fara upp í Norðuratlantsbólkin saman við Tjóðveldisflokkinum. Vit ætla als ikki at hjálpa loysingarkreftunum, sum royna at útflyta føroyska sjálvstýrismálið til Christiansborg.

**Okkara aðalmál**

Vit í Sambandsflokkinum fara at taka okkum væl av øllum felagsmálunum og arbeiða fyri at ávirka øll viðurskifti, sum hava við Føroyar at gera. Millum aðalmálini í komandi fólkatingsetu eru nýskipan av viðurskiftunum í ríkisfelagsskapinum, víðkaðar heimildir á uttanríkisøkinum og ein loysn á flogvallarmálinum.

**Samstarv á fólkatingi**

Okkara atkvøða á fólkatingi skal ikki brúkast til at trýsta mál ígjøgnum, sum bert hava týdning fyri danir. Vit ætla at halda fram sum partur av tingbólkinum hjá Vinstra fyri at menna okkara samstarvsmøguleikar, soleiðis at vit altíð at sleppa inn í eina og hvørja fólkatingsnevnd, har mál av áhuga fyri okkum verða viðgjørd.

Vit fara at samstarva á fólkatingi til frama fyri øll áhugamál føroyinga og fyri ríkisfelagsskapin. Grundlógartryggjaði rættur føroyinga fer at verða brúktur sum tað sømir seg, við spekt og sóma, um Sambandsflokkurin fær umboð á fólkating.

Sambandspolitikkur er í tráð við politiska rákið her í okkara parti av heiminum. Framkomni parturin av heiminum kastar saman á flestu økjum fyri at vinna sær rættindi og fyrimunir og fyri at standa sterkari, búskaparliga, handilsliga, mentunarliga og í aðrar mátar.

**Eitt einfalt val**

Sambandsflokkurin er nú sum fyrr einasta alternativið fyri einari føroyskari framtíð innan fyri ríkisfelagsskapin. Týsdagin hevur tú seks flokkar at velja ímillum, men bert tveir veruligar politiskar valmøguleikar.

Ein álítandi og støðufastan Sambandsflokk, sum vil samstarva innan fyri ríkisfelagsskapin, ella hinar flokkarnar, sum einu løtuna vilja loysing og hinu løtuna samband.

Hugsið um tað á valdegnum 8 februar.

# Tað ber væl til at standa saman og lyfta í felag

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*



VAL05

At vit standa saman sum fólk, merkir ikki, at vit øll skulu vera eins ella hava somu meiningar. Men tað merkir at vit standa saman um Føroyar. Standa saman um at vinna øll tey rættindi, sum ein tjóð hevur rætt til, og standa saman um at tryggja, at vit eisini í framtíðini kunnu vera ymisk, fjølbroytt og fræls, og at pláss er fyri øllum - og serstakliga fyri teimum, sum av ymsum ávum fingu tað trupult. Standa saman um at lyfta í felag.

Tað er hesi virði sum til samans mynda okkara samleika. Tað er eingin sjálvfylgja, at tað er so, tað er ein gáva, og tað er ein uppgáva hvønn dag. Hjá tær og hjá mær - og sjálvandi eisini hjá okkara politisku leiðslu.

Sum skipanin er í dag, eru tað framvegis nógv mál, sum okkara vegna verða avgjørd í Fólkatinginum. Í hesum málum skal føroyska fólkatingsumboðanin tryggja føroyingum ávirkan. Harumframt skal fólkatingumboðið skapa góð sambond við politikarar og slóða fyri, at danir betur skilja føroysk viðurskifti og okkara serstøðu.

Vit vita av royndum, at samanbrestir føra ikki á mál. Men tað gevur heldur einki úrslit at vera undirbrotligur. Tað sum um ræður er við gløggskygni at finna ta breiðu semjuna, at knýta tey røttu sambondini út í heim, og at lofta møguleikum og avbjóðingum, tá ið teir vísa seg.

Tað er ikki løtuverk, og tað ber bert til, um fólkatingsumboðið dagliga og áhaldandi ferðast í umhvørvinum, har avgerðirnar verða tiknar. Tað ber ikki til, um fólkatingsumboðið samstundis skal røkja ein sess í Løgtinginum.

# VÁRMØÐI – HEYSTGRØÐI

**tórbjørn jacobsen**



VAL05

Tað er júka so uppí saman um tað, at Føroyar fóru á húsagang, fyrst í nítiárunum, at ongin orkar at hoyra um tað longur, uttan kanska tey sum kendu ringasta sviðan av hesum, og máttu ganga frá húsi og heimi. Beisknið hjá teimum, ið rýmdu í útlegd, og ikki hættaðu sær heimaftur, hasar neyvan av aftur í bræði heldur.

Danska Fíggjareftirlitið gjørdist ein rættiliga aktivur aktørur í øllum tí sum hendi hesa tíðina. Lá inni við vitalum upplýsingum um støðuna í føroyska fíggjarkervinum, sum heimastýrispolitikkararnir úti í Tinganesi onki vistu um. Ongin lat frætta frá sær. Heimildir skuldu ikki vera fyri tí. Hinvegin varð og verður danska stjørnin áhaldandi kunnað um støðuna í føroysku bankunum og í fíggjarkervinum annars.

Hóast tørvur ikki var á at duga meira enn lítlutabell fyri at skyna á, at kollapsið varð óundansleppandi, so var hendan vantandi kunningin brúkt sum undanførsla fyri, at røttu stigini ikki vóru tikin í góðari tíð, ið kundu havt forðað fyri uppganginum, ið seinri jarðlegði brimgarðarnar um tær búskaparligu Føroyar.

Hetta var eitt afturvendandi tema í fleiri valorrustum, og menn løgdu doyin á, at skil og batar fóru at koma, soleiðis at hetta ikki skuldi henda aftur, ið hvussu er ikki av vantandi kunning, og vitan um støðuna, í so góðari tíð, at borð kundi byggjast fyri báru.

Men tað hendi onki. Flosklar og tómt tos. Valagn og óleskiligar beitur.

Sum fólkatingsmaður setti eg mær fyri at gera nakað við hetta málið. Helt tað vera rættiliga órímiligt, fyri ikki at siga óforskammað, at Føroya Landsstýrið ikki altíð lá inni við somu upplýsingum, um veruligu støðuna í føroyskum peningastovnum, sum danska stjørnin gjørdi.

28. februar 2003 var spurningurin reistur á Fólkatingi og á grækarismessu sama ári svaraði Bendt Bendtsen, at hann ikki ætlaði sær at gera nakrar broytingar í mannagongdunum hesum viðvíkjandi, og vísti til alt handa slag av forðingum í so máta.

Við góðari hjálp frá einum advokati í Havn snikkaðu vit tríggir, Kuupik Kleist, Lars-Emil Johansen og undirritaði eitt uppskot saman til samtyktar um hetta sama mál. Málið kom fyri á Fólkatingi, men vann ikki frama. Meiriluti var ikki fyri tí.

Men málið var nú reist á røttum staði. Fjølmiðlarnir í Føroyum tóku tað upp til viðgerðar og Anders Fogh Rasmussen segði seinri, at hann var sinnaður fyri, at málið var loyst soleiðis, at føroyingar fingu sama innlit sum danska stjórnin, um støðuna í føroyskum peningastovnum.

Hin oftast skilagóði Bárður Nielsen, onkur væntar, at hann longu eftir valið týsdagin verður nýggjur formaður í Sambandsflokkinum, eftir allar kajtúrarnar hjá Kaj í seinastuni, fór síðani í samráðing við Bendt Bendtsen um málið, og seinri funnu teir báðir eina loysn, sum fyribils sigst vera nøktandi fyri landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Soleiðis ber tað til at snúgva sjálvt Sambandsflokkin á gongdar leiðir. Norðuratlantsbólkurin reisti málið, donsku blokadurnar forðaðu í fyrstu og aðru atløgu, men prosessin var farin í gongd og Sambandsflokkurin fekk alt serverað á einum silvurfati. Hetta er hin klassiska søgan. Vit áttu vármøðina — Bárður heystgrøðina. Tað kann nú vera líkamikið. Hetta var í øllum førum Føroyum at frama. Einum íðnum og konstruktivum politikki hjá norðuratlantiska tingbólkinum á Danatingi fyri at takka.